## UTTAN ÚR HEIMI

## Jusjtsjenko ruddar

Forsetin í Ukraina, Viktor Jusjtsjenko, kunngjørdi mánadagin, at hann hevur sett sær fyri at beina fyri øllum ónollum í ukrainsku løgregluni.

Endamálið við átakinum er fyrst og fremst at gera enda á øllum skuldsetingum um, at løgreglan hevur í so gott samband við tey skipaðu brotsmannaliðini, og at løgreglan gleðiliga letur brotsmenninar fáa frið, bara hon fær nóg mikið av pengum afturfyri. Harumframt hevur ferðsluløgreglan verið undir áhaldandi skuldsetingum, og tí hevur forsetin gjørt av at taka hana av, skrivar AP úr Kiev.

- Tann skipaði kriminaliteturin skal skrykkjast upp við rót, tí tað ber ikki til, at løgreglan verjir hann, segði ukrainski forsetin mánadagin. Justsjenko hevur eisini boðað frá, at hann fer at seta nýggj embætisfólk í innanríkisráðið, sum hevur ábyrgdina av løgregluni.

## Seldu pinkubørn

Í Kina hevur løgreglan tikið 28 fólk, tí illgruni er um, at tey hava selt pinkubørn, skrivar AP.

Løgreglan hevur leingi hildið eygað við einum brotsmannaliði, sum hevur verið serliga virkið miðskeiðis í landinum. Í síðstu viku gjørdi løgreglan so bart og handtók tey 28 fólkini, og tey eru nú skuldsett fyri at hava selt 27 pinkubørn. Tað yngsta var bara níggju dagar gamalt. Ein talsmaður hjá løgregluni sigur, at tey flestu børnini eru komin afturíaftur, men at kanningarnar eru ikki lidnar kortini.

Hildið verður, at fleiri túsund smábørn verða burturflutt ella keypt í Kina á hvørjum ári. Keypararnir eru hjún, sum vilja hava fleiri børn, og ofta eru tað foreldur, sum eiga ein son, ið keypa eina gentu, so tey bæði kunnu giftast seinni. Kinesiska lóggávan er annars sera strong, tá tað snýr seg um mannahandil, og tey, sum verða funnin sek, kunnu fáa deyðarevsing.

## Borgarstjóri fekk sekkin

Nú um dagarnar bleiv Michael Zucchet valdur til borgarstjóra í amerikanska býnum San Diego, men longu dagin eftir noyddist hann at siga borgarstjórasessin frá sær, tí tað bleiv avdúkað, at hann hevði tikið ímóti mutri frá einum klubba, sum brúkar naknar dansigentur.

Maðurin, sum átti klubban, hevði boðið summum politikarum pengar afturfyri, um teir vildu virka fyri, at klubbar sum hansara fingu betri umstøður at virka undir. Býráðið í San Diego hevur fyrr samtykt, at gestirnir í hesum klubbunum máttu ikki nema við dansigenturnar, og teir máttu heldur ikki geva teimum pengar.

Sambært ákæruvaldinum játtaði Michhael Zucchet at hjálpa klubbanum, aftur fyri at hann fekk34.500 dollarar. Hann hevur játtað seg sekan og kann nú vænta at fáa upp í fýra ára fongsul. FBI, sum hevur kannað málið, sigur, at ein av ráðgevunum hjá tí fráfarna borgarstjóranum verður eisini ákærdur, tí hann var hjástaddur, tá borgarstjórin játtaði at hjálpa klubbanum aftur fyri pengar.

## Fleiri tikarar í Sibiria

Í fleiri ár hava myndugleikarnir og djóraverndarfelagsskapirnir í Russlandi kært seg um, at tær sibirisku tikararnir gjørdust færri og færri í tali, men nú vísir ein nýggj kanning, at stovnurin er farin at veksa aftur.

Sambært kanningini eru 400 vaksnir tikarar og 100 ungar í Sibiria nú, men tað merkir kortini ikki, at stovnurin er nóg stórur, siga teir russisku myndugleikarnir. Kortini heldur World Wildlife Foundation, at tað er sera hugaligt, at tann sibiriski tikarastovnurin er í vøkstri, tí alla aðrastaðni í heiminum gerast tikararnir færri og færri í tali. Tað kemst fyrst og fremst av, at nógvir tikarar verða skotnir, sjálvt um tað er ólógligt, sigur WWF.

Tann sibiriski tikarin er sera styggur, og tí var tað alt annað enn lætt hjá teimum russisku myndugleikunum at telja, hvussu nógv er til av honum. Harafturat kemur, at økið, sum tikarin heldur til í, er sera stórt.



*Fyrireikararnir vænta, at umleið 100.000 fólk fara at taka lut í mótmælisgonguni til Gaza-geiran*

# Vandi fyri roki í Ísrael

**Ísraelska løgreglan stendur tilbúgvin, tí fleiri túsund ísraelsmenn hótta við at bróta seg ígjøgnum vegabyrgingarnar til Gaza-geiran at stuðla niðursetumonnunum har**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Støðan er spent í Ísrael. Stjórnin hevur gjørt av at flyta øll niðursetufólkini úr Gaza-geiranum, men tað vilja nógvir ísraelsmenn ikki góðtaka, og teir hava nú sett seg upp ímóti myndugleikunum.

Gjáramorgunin fekk løgreglan boð um hægstu tilbúgving við markið til Gaza-geiran, eftir at umleið 20.000 fólk høvdu brotið seg ígjøgnum byrgingarnar hjá løgregluni við býin Netivot. Haðani eru umleið 25 kilometrar til niðursetubygdina Gush Katif, sum er í Gaza-geiranum,og mótmælisfólkini hava boðað frá, at tey ætla sær hagar. Tey, sum skipa fyri mótmælinum, rokna við, at umleið 100.000 fólk fara til Gush Katif.

Blaðið Haaretz skrivaði í gjár, at løgreglan hevur sent boð eftir øllum sínum monnum, og at fleiri løgreglulið í øðrum býum hava fingið boð um at fara suður til Gaza-markið.

Stjórnin hjá Ariel Sharon, forsætisráðharra hevur boðað frá, at hon fer ikki at slaka, og at tey fyrstu niðursetufólkini verða flutt úr Gaza tann 15. august, sama um tey vilja ella ei. Sambært Haaretz stúrir stjórnin kortini fyri, at tey nógvu mótmælisfólkini fara at órógva afturtøkuna. Tí hevur stjórnin bannað ísraelsmonnum at fara til Gaza-geiran, men hesum lurta mótmælisfólkini ikki eftir.

Tá mótmælisfólkini komu til Netivot, fóru tey á grøvina hjá einum jødiskum vísmanni, og har gjørdi fyrrverandi yvirrabbinarin Mordechai Eliahu greitt, at mótmælisfólkini fara ikki at gera eftir boðum frá myndugleikunum.

- Eingin skal reka okkum burtur úr landi okkara, tí tað er ein gáva, sum Guð hevur givið okkum, segði hann í einari røðu fyri teimum nógvu mótmælisfólkunum.

# Orkunýtslan í heiminum nógv økt

**Eftirspurningurin eftir orku er tann størsti síðani miðskeiðis í áttatiárunum**

ORKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ei undur í, at oljuprísurin setir eitt met fyri og annað eftir í hesum tíðum.

Ein kanning, sum bretska oljufelagið BP hevur gjørt, vísir, at eftirspurningurin eftir orku var metstórur í fjør. Serliga kinesarar høvdu tørv á munandi meiri orku enn fyrr, og bara har vaks eftirspurningurin heili 15,1 prosent. Tað gjørdi, at heimsnýtslan vaks 4,3 prosent, og so stórur hevur vøksturin ikki verið síðani miðskeiðis í áttatiárunum, sigur BP.

Kanningin hjá felagnum vísir, at vit brúktu meiri av øllum orkukeldum í fjør enn fyrr. Kolnýtslan vaks 6,3 prosent í fjør, oljunýtslan vaks 3,4 prosent, og vit brúktu 3,4 prosent meiri gass. Eisini kjarnorkuverkini høvdu meiri at gera í fjør. Har vaks eftirspurningurin 4,4 prosent.